# Veiðihagtøl fyri lunda

Bergur Olsen og Jens-Kjeld Jensen 24.1.2011

Her verður ein samandráttur skrivaður um tey fyrstu úrslitini. Seinni verður ein nágreinilig frágreiðing skrivað sum eitt smárit til Havstovuna, har øll tølini eru við, og síðani verður ein vísindalig grein skrivað á enskum.

## Inngangur

í 1939 ferðaðist Sverre Patursson runt í landinum og savnaði upplýsingar um, hvussu nógvur lundi varð veiddur i teimum ymsu plássunum um tað mundið (Patursson 1939). Samlaða úrslitið var 150.000 lundar, men tá vóru ikki allar oyggjarnar við. Í 1946 (Patursson 1946) metir Sverre, at samlaða veiðan er um 200.000 lundar. Síðani tá hevur ikki verið nøkur skipað innsavning ella skráseting av veiðihagtølum fyri lunda, men Jákup Sverri Joensen metti í 1968, at 85.265 lundar vórðu fleygaðir um árið (Joensen 1968). Vit vitstu um onkrar menn, sum høvdu skrivað niður, hvat teir høvdu fingið, og vit hava eisini sjálvir roynt at fylgt við og biðið menn skrivað niður seinastu árini. Endamálið við hesi verkætlan er at savna øll hesi tøl, sum ikki eru almannakunngjørd og at leita fram onnur veiðitøl áðrenn ov seint er. Úrslitið kann m.a. nýtast til at meta um, hvussu lundastovnurin hevur verið fyri seinastu árini, og hvussu nógva veiðu hann tolir.

## Framferð

Vit hava tosað við fleygingamenn í øllum landinum og spurt, um teir hava veiðitøl liggjandi. Nøkur av veiðitølunum hava vit fingið regluliga seinastu árini við at tosa við fleygingamenn, tá ið fleygingatíðin var liðug. Onnur tøl hava verið skrivað upp í bøkur ella á veggin í teimum húsunum, sum verða nýtt í samband við ludnafleyg, og tey tølini hava vit fingið fleygingamenninar at skrivað av. Í onkrum plássum verður landpartur framvegis latin, og summa staðni eru hesi tøl goymd, so vit hava kunnað roknað okkum fram til veiðuna.

Onnur veiðitøl finnast í gomlum varðveittum skjølum t.d. sum tíggjund í kirkju-roknskapinum, í Løbners tabellum og í sýslumannsfrágreiðingum frá grannastevnum, men hesi tøl eru ikki tikin við her.

## Úrslit

Vit hava fingið flest úrslit fyri tey seinastu 20 árunum, men vit komu eisini fram á tøl fyrst í 20. øld, sum annars kundu farið fyri skeytið.



Mynd 1. Esbern í Eyðanstovu á fleyg í Mykinesi.

Mest verður fleygað í Mykinesi. Her hevur Esbern í Eyðanstovu fylgt við og mett um, hvussu nógv er fleygað til samans á næstan hvørjum ári síðani 2001, og Bjarni Hansen hevur skrivað niður, hvussu nógv er fleygað í hansara haga, Lamba og Undir Rógvuni, síðani 1995. Út frá hesum tølum kann roknast við, at samlaða veiðan í Mykinesi hevur verið, sum víst á mynd 2.




Mynd 2. Samlaða lundaveiðan í Mykinesi 1995-2010. Útroknað tøl við Lamba og Undir Rógvuni sum fyrimynd. Ein týðilig minking er hend frá 2003 og frameftir.



Mynd 2. Oskar Joensen á veg heim við lundabyrðu.

Tann longsta tíðarrøðin er frá Seyðtorvu í Viðoynni. Hon byrjar longu í 1968 og er uttan slit frá 1978 til 2010. Í fleiri ár hava fleygingamenninir eisini skrivað niður, hvussu nógv teir hava fingið hvørja ferð. Úr Nólsoynni eru sera neyvar upplýsingar, har vit vita, hvussu nógv er fleygað hvønn dag síðani 1996, og hvussu nógv er fingið í teimum einstøku sessunum. Í Skúvoynni verður 1/3 latin í landpart, og landparturin er skrivaður niður síðani 1995, so til ber at rokna veiðina. Tann samlaða veiðan fyri hesi trý plássini er sett upp í mynd 3, og her sæst, á sama hátt sum í Mykinesi, ein týðilig minking frá 2003 og frameftir.




Mynd 3. Veiðan av lunda í Viðoynni, Nólsoynni og Skúvoynni. Stór sveiggj eru í veiðini, men ein tíðilig minking er hend í 2003 og frameftir.

Um seinasta aldamótið vóru nøkur heilt góð lundaár, og tá vórðu fleygaðir knapt 100.000 lundar um árið, men seinastu 8 árini hevur at kalla onki verið at fingið, og seinasta summar (2010) bar av, tí tá varð bert fleygað í Mykinesi, St. Dímun og L. Dímun og samlaða veiðan var einans 339 lundar. So vánalig hevur lundaveiðan ongantíð verið, tað vit vita um.

Samlaða úrslitið, sum vit hava fingið fyri ár 2000 og 2010 er víst í talvu 1, saman við eldri úrslitum. Tey flestu úrslitini eru frá Sverre Patursson (Patursson 1939), tá hann ferðaðist runt í landinum og tosaði við fólk um lundaveiðu um ár 1939 og „fyrr í tíðini," sum her er sett til ár 1900.

Talva 1. Tøl, sum vit hava fingið frá fleygingamonnum og øðrum heimildarfólki, samanborin við Patursson 1939 og eldri heimildir. [1] Talið er frá 2001, [2] 1908, Pól á Mýrini 1976. [3] 1920. Arne Nørrevang 1977. [4] Brøgger, A.W. 1937.

| | 1900 | 1939 | 2000 | 2010 |
|---|---|---|---|---|
| Mykines | 80.000 | 39.300 | 22.500[1] | 300 |
| Tindhólmur | | 8.000 | 2.185 | 0 |
| Vágoy | | 13.320 | 1.500 | 0 |
| Streymoy | | | 7006 | 0 |
| Eysturoy | | 0 | 0 | 0 |
| Kalsoy | | 13.500 | 8.950 | 0 |
| Kunoy | | 0 | 0 | 0 |
| Borðoy | | 0 | 0 | 0 |
| Viðoy | 51.000 | 20.000 | 3.500 | 0 |
| Fugloy | 20.000 | 11.000 | 5.500 | 0 |
| Svínoy | | 2.150 | 500 | 0 |
| Nólsoy | 36.000[2] | | 12.758 | 0 |
| Koltur | | | 963 | 0 |
| Hestur | | 10.900 | ? | 0 |
| Sandoy | | 22.000 | 8.000 | 0 |
| Skúvoy | 45.000[3] | | 4.575 | 0 |
| St. Dímun | 10.000[3] | 6.500[4] | 3.000 | 18 |
| L. Dímun | 18.000 | 6.000 | 7.140 | 21 |
| Suðuroy | | 11.900 | 6.980 | 0 |
| Til samans | | 158.070 | 95.057 | 339 |

Sum sæst í talvu 1, so hevur tað alla staðni verið ein minking seinastu hundrað árini. Har tað ber til at samanbera tølini beinleiðis, hevur minkingin verið 54% frá 1900 til 1939 (179.000 - 82.800 lundar) og tilsvarandi 55% minking frá 1939 til 2000 (153.670 - 69.755 lundar) og seinastu 10 árini er veiðan so minkað niður í onki. Eftir hesum at døma, hevur veiðan verið heilar 400.000 lundar um ár 1900, sum man vera tað mesta, sum er veitt, tí í 1862 metti H.C. Muller (1862), at miðal veiðan var 235.000 lundar. Fram til 1954, tá nýggj veiðilóg kom í gildi, var eisini vanligt at draga lunda (taka hann úr holuni) og hesin fuglurin er við í teimum gomlu tølunum.

Hóast lundaveiðan hevur verið sera stór, so er tað ikki veiðan, sum er orsøkin til ta stóru minkingina seinastu 8 árini. Hendan minkingin er orsakað av føðitroti. Nú lundastovnurin er so illa fyri, og fáar pisur eru komnar undan í nógv ár, er tó neyðugt at avmarka veiðuna tey komndi árini, tí tað kunnu skjótt koma ár, har meira føði verður, og nógvur fuglur verður at fleyga, men so verður tað bert búfuglur, ið verður fleygaður, tí ongar pisur eru komnar undan seinastu árini.

Tað verður ofta sagt, at fleygingastongin bert tekur ungfugl, og at sildberar ikki verða tiknir. Hetta er partvís rætt, men ein onnur kanning hjá okkum vísir, at sjálvt tey góðu árini um ár 2000 var helvtin av teimum fleygaðu lundunum gamal fuglur (eldri enn 3 ár), og tey ringu árini var næstan alt gamal fuglur. So sjálvt um sildberar ikki verða tiknir, so verða kortini nógvir búfuglar tiknir við stong, og tá fáar pisur koma undan fleiri ár á rað, sum tað er hent hesi seinastu árini, so verður alt gamal fuglur, sum verður fleygaður fyrstu tíðina. Tað verður tí alneyðugt við eini avmarking ella friðing, til stovnurin er komin fyri seg aftur.

**Heimildir**


Brøgger, A. W. 1937.Hvussu vórðu Føroyar Bygdar. Inngangur til Løgtingssøgu Føroya. Tórshavn.

Joensen, J.S. 1968. Í Trap, J.P.1968, Færøerne. G.E.C.Gads Forlag. København.

Müller, H.C. 1862. Færöernes Fuglefauna med Bemærkninger om Fuglefangsten. Vidensk. Medd. fra Dansk Naturh. Foren. 24: 1-78.

Mýrini, P. á 1976. Útvarpssending.

Nørrevang, A. 1977. Fuglegangsten på Færøerne. Rhodos, København, 275 s.

Patursson, S. 1939. Lundamangi í Føroyum. Frágreiðing til Føroya Búnaðarráð. 27 s.

Patursson, S.1946. Fuglebestanden på Førøyane. Naturen: 179-186